




# Kongaligar garnlýsingar

KANN TAÐ VERULIGA VERA **MARY** KRÚNPRINSESSA, SUM ER Á EINUM **LÝSINGARSKELTI**? SOLEIÐIS HAVA ÓIVAÐ NÓGV HUGSAÐ, SUM HAVA KOYRT FRAMVIÐ STÓRU **LÝSINGUNUM** Í MIÐBÝNUM Í HAVN. **SISSAL CARLSDÓTTIR Á LAG** ER MANGAN STEÐGAÐ AV FÓLKI, IÐ HAVA HILDIÐ HANA VERIÐ **PRINSESSUNA**



**GARNLÝSINGAR**
Inna Törnroos
inna@sosialurin.fo

Hvørki Sissal ella fyritøkan, hon lýsur fyri, Sirri, vilja verða við, at tað var nakar tanki aftanfyri, at hon líkist so nógv donsku krúnprinsessuni á lýsingartalvunum.

– Eg varð nógv steðgað fyrr, bæði í Føroyum og í Danmark, og fólk hildu, at eg var prinsessan. Men nú er tað ikki líka nógv longur, sigur Sissal Carlsdóttir á Lag.

Hon hevur verið modell fleiri ferðir áður, fyri millum annað SMS og blaðið Kvinnu.

– Eg helt at hesar myndirnar skulu vera smáar lýsingar í bløðum, so eg varð rættuliga skelkað, tá eg sá stórtalvurnar við mær sjálvari á, sigur Sissal.

Fotografurin Sunrid í Gongd hevur tikið myndirnar.

Óluva á Lofti, eigari av Sirri, er sera nøgd við lýsingarnar.

– Vit valdu Sissal, tí hon er ein vøkur føroysk kvinna, ið sær natúrlig og norðurlendsk út, sigur hon.

At Sissal var lík prinsessuni Mary var einki sum Óluva legði nakran dent á.

– Vit eru sera nøgd við myndirnar og hava bara fingið positivar reaktiónir uppá tær.

## KLUMMAN



*Randi Jacobsen*

# Tenninar eru privatar – oyruni almenn

Nú ein dagin var eg sum so ofta hjá tannlækna. Alt gott um tað, eg fekk góða hjálp og rindaði ta sámiligu rokningina. Tó helt eg tað vera løgið, at Heilsutrygd ikki letur nakran stuðul til doyvingina. Tað tulki eg sum, at tað er luksus ikki at vilja pínast.

Á veg heim aftur komi eg at hugsa um, hví vit skulu gjalda fyri summar heilsutænastur og ikki aðrar. Her síggja vit burtur frá, at Heilsutrygd rindar ein part av rokningunum.

Tað veldst um, hvør kropsluturin er. Mannamunur verður gjørdur á teimum ymisku kropslutunum.

Lat okkum byrja úr erva.

Eyguni: Vit fáa ávísing til at fara til eygnalækna og gjalda ikki, men skulu vit hava brillur ella linsur, gjalda vit.

Oyruni: Ávísing til oyrnalækna er ókeypis, men hoyritólið gjalda vit fyri.

Nøs- og hálsur: Kanningar og viðgerð fara fram á sjúkrahúsinum, og tað rindar tað almenna.

Er okkurt galið innvortis, í hjarta, lungum, nýrum, livur, maga o.s.v., eru hetta uppgávur, sum tað almenna fult út tekur sær av.

Summi, ið eta seg um rygg, fáa viðgerðina goldna av ti almenna.

Tey, sum drekka seg út av nálini, fáa alla hjálp goldna av tí almenna.

Royking er privat.

Um vit bróta bein ella armar, fáa vit viðgerð á sjúkrahúsi, og tað almenna rindar.

Men tá ið vit so koma til okkurt slit av arbeiði og hava tørv á hjálp frá fysioterapeuti ella kiropraktori, eiga vit rokningina.

Hvar er logikkurin?



## INNIHALD

4 PERSÓNSSØGA: **LÍVIÐ AFTANÁ STORD**
7 TIPS: **PÁSKAGULT**
8 90 SEKUND: **SIGRIÐ RASMUSSEN**
9 10 TING UM **EINSTEIN**
10 **PÁSKAPENT**
12 TIL ARBEIÐIS: **PETURBJØRG POULSEN VIÐ PÁSKAREGGUNUM**
13 UMAFTURAFTURUMAFTUR: **HØGNI DJURHUUS**
14 HUGLEIÐING: **KANN FØSTAN FÁA ENDURREISN?**
16 SAMRØÐA: **KIRKJAN GEVUR MÆR BENSIN Á TANGAN**
18 GERA STÓRFILM UM **KON TIKI**
19 HEILSUSÍÐAN: **TÁ BØRNINI ERU OV FEIT**
20 LISTAMAÐURIN: **HEIÐRIK HIN ÓVANLIGI**
22 HUGLEIÐING: **PÁSKAMINNIR ÚR LONDON**
24 APRÍL, APRÍL: **MINNILIGAR APRÍLSØGUR**
26 SPYRST SO LIVST: **RIGMOR SVARAR**
27 MÍN BESTA UPPSKRIFT: **MARENGS HØSNARUNGAR**
31 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, SENDINGAR, TILTØK OSV**
32 VIKUMYNDIN: **BESTA MYNDIN Í VIKUNI**

VIKUSKIFTI
**Redaktørar:** Inna Törnroos og Eydna Skaale
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Páskaeingil úr glasi